# Bert Jónas við hjá Frem

**Jón Rói Jacobsen er skaddur, og tí var tað bert Jónas Tór Næss av føroyingunum í Frem, sum var á vøllinum, tá Frem týskvøldið spældi málleysan javnleik móti svenska Landskrona**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum vit eisin umrøddu í blaðnum í gjár, so hevur ungi havnardrongurin Jónas Tór Næss tryggjað sær sáttmála sum yrkisleikari í danska felagnum Frem, sum eisini hevur landsliðsleikaran Jón Róa Jacobsen í hópinum.

### Skaða í fótinum

Týskvøldið spældi Frem venjingardyst móti svenska liðnum við tí fyri fótbóltsáhugaðar føroyingar so kenda navninum Landskrona. Dysturin endaði við málleysum javnleiki, 0-0, og Jónas Tór Næss var einasti føroyingurin á liðnum hjá Frem í dystinum. Hann byrjaði á beinkinum, men var skiftur inn.

Jón Rói Jacobsen hevur ein skaða í fótinum, sum hann fekk, tí at hann sparkaði upp undir skógvarnar hjá einum liðfelaga undir venjing. Skaðin tykist tó ikki verða so álvarsamur, og væntandi verður hann klárur aftur í næstum.

## Stjørnan skipar fyri ókeypis bussferð

Í samband við steypafinaluna í Havn leygardagin millum Stjørnuna og Neistan, skipar Stjørnan fyri ókeypis bussambandi úr Leirvík til Havnar og aftur til Leirvíkar eftir dystin. Farið verður av Klaksvík við Dúgvuni kl. 10.15.

Tilmelding fer fram á Kunningarstovuni í Klaksvík tlf. 456939 ella á 216939 innan kl. 18.00 fríggjadagin.

**tn**

# Hallur longt við HB

**HB hevur longt sáttmálan við roynda verju- og miðvallarleikaran Hallur Danielsen við einum ári**

FÓTBÓLTSSÁTTMÁLAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Havnar Bóltfelag upplýsir á heimasíðu sínari, at felagið í harðari kapping við onnur feløg hevur tryggjað sær Hall Danielsen fyri komandi kappingarár. Tað hevur annars gingið sum slatur, at Hallur var á veg til grannarnar í B36, men hesin slatur er nú, eftir at hann hevur sett navn undir ein nýggjan eitt-ára sáttmála við greipuvinnararnar.



*Hallur Danielsen hevur longt sáttmálan hjá sær við HB, hóast fleiri onnur feløg sýndu veteraninum áhuga.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Nærkast 250 dystum

Hallur er í løtuni nummar seks á listanum yvir teir leikarar, sum hava spælt flest dystir fyri HB. Undan hesum kappingarárinum hevur hann leikt 237 dystir á besta mansliðnum hjá HB, og sambært heimasíðuni hjá HB ætlar Hallur at vinna seg upp á fjórðaplássið hjá Gunnar Mohr, sum hevur leikt 272 dystir.

# Útisetarnir aftur í eldin

**Talv: Fimta umfarið í donsku Skakliguni verður telvt sunnudagin**



*Eyðun Nolsøe, v.m., er ein kærkomin styrkur hjá føroysku talvútisetunum, sum skulu í dyst um vikuskiftið.*
*savnsmynd*

Føroyska útisetatalvfelagið, SF Føroyar, skal sunnudagin aftur royna seg í bestu donsku deildini, sum nevnist Skakligan. Føroyingarnir skulu dystast móti K41, sum hoyrir heima í Valby í Keypmannahavn.

Eftir eina sera góða byrjan upp á kappingarárið lá SF Føroyar eitt skifti heilt frammi á øðrum plássi í liguni. Eitt stórtap móti Brønshøj i fjórða umfari viðførdi tó, at liðið fall heilt aftur á sætta pláss. Føroyska felagið hevur sum nú er manning til at standa seg millum bestu donsku feløgini, men hópurin er smalur, og gerast avboðini ov mong til dystirnar, gerst róðurin tungur.

### Botndystur

Undan vikuskiftinum hevur SF Føroyar 15 stig, og røkkur hetta altso til eitt sættapláss á stigatalvuni í løtuni. K41, sum er mótstøðuliðið hesaferð, liggur hinvegin greitt á aftasta plássi við einans 8_ stigi. Hetta er eitt sindur óvæntað, tí K41 hevur í roynd og veru nógvar góðar telvarar í felagnum, men eisini teir hava verið hart raktir av avboðum.

Svenski altjóða meistarin Emil Hermansen plagar at telva við K41, men væntandi telvar hann ikki við teimum hesaferð, tí hann er í Føroyum, har hann er venjari hjá føroysku unglingunum, sum skulu royna seg í NM-kapping í næstum. Hinvegin, so er Heini Olsen, sum vanligar telvar á 3. borði fyri SF Føroyar, ei heldur við á hesum sinni, tí hann er staddur í Føroyum. Terji Petersen er heldur ikki tøkur hetta vikuskiftið. Tíbetur, so styrkir Eyðun Nolsøe um liðið til júst hendan dystin. Eyðun hevur verið og vitnað í einum sakarmáli á Mallorca, og er í tí sambandi staddur í Keypmannahavn, tá dysturin verður leiktur.

Um K41 mannar seg nøkunlunda sum vant, so verða manningar báðar sunnudagin væntandi nakað soleiðis. Í klombrum eru donsku styrkitølini hjá telvarunum.

SF Føroyar - K41
Nikolaj Borge (2404) - Henrik El-Kher (2430)
John Arni Nilssen (2403) - Jacob Øst Hansen (2443)
Flóvin Tór Næs (2303) - Esben Lund (2296)
Eyðun Nolsøe (2230) - Kristen Schmidt (2352)
Carl Eli N. Samuelsen (2195) - Martin Olesen (2285)
Heini Danielsen (2149) - Roland Greger (2311)
Poul Martin Hansen (1849) - Jens Hartung Nielsen (2184)
Ian Leyni (1838) - Niels Edoo (1924)

Sum tað eisini sæst á styrkitølunum, so er botnliðið væl mannað, og hetta uttan onkran av teirra bestu monnum. Eitt nú endaði tann ungi Henrik El-Kher á 2. plássi í DM-kappingini fyri einstaklingar í fjør.

Eingin ivi er um, at K41 ætlar sær ein stórsigur móti føroyingunum, tí annars fer tað veruliga at síggja svart út hjá teimum í niðurflytingarstríðnum. Føroyska liðið kann hinvegin vera væl nøgt, um ein 4-4 javnleikur fæst í hús. Um so var, so hevði niðurflytingin helst ikki komið upp á tal, og á tann hátt, so hevði sambandið við oddin heldur ikki heilt horvið.

Sum nú er, hevur føroyska liðið trý stig upp til Helsingør, sum er næstfremst við 18 stigum. Eins og vant, so er nærum eingin spenningur um, hvar DM-heitið endar, tí meistararnir seinastu trý árini úr Helsinge eru klárt á odda við 24 1/2 stigi.